

# Meistaranir til Cypros

Hóast ferðaútreiðslurnar helst verða hampuliga stórar, so er lítil ivi um, at talan er um spennandi lutakast, sum EB/Streymur fekk í gjár, tá lutur varð kastaður um dystirnar í Champions League undankappingini. Føroysku meistararnir trektu Apoel Nicosia av Cypros, og fyrri dysturin verður spældur í Føroyum tann 15. juli. Seinni dysturin verður spældur á Cypros tann 22. juli.

- Cypros hevi í fjør eitt lið, sum var heilt nær við at spæla seg víðari úr bólkaspælinum í Champions League, sigur Sigfríður Clementsen, sum er venjari hjá EB/Streymi.

- So tað er einki at ivast í, at støðið er høgt, men hinvegin hevur føroyska landsliðið fingið góð úrslit móti Cypros.

- Men á felagsstigi, so er einki at ivast í, at Cypros hevur sterk lið. Og seinnu árini eru fleiri útlendskir profilar keyptir til feløgini. Eg veit ikki, hvussu hópurin hjá Apoel Nicosia sær út, men tað fara vit so at seta okkum inn í.

- Hinvegin er einki at ivast í, at bara tað at fara til Cypros, er ein stór avbjóðing í sjálvum sær. Ikki minst orsakað av hitanum, sigur Sigfríður Clementsen.

# Tað er ikki so galið í Kollafirði



*Teir fóru enn eina ferð stavn um stavn inn um málið, men hesa ferð var Klaksvíkingurin fremsti báturin í 10-mannafarsróðrinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tað er langt ímillum sigrarnar hjá klaksvíkingum, sum nú hava vunnið tvær ferðir á rað á sundalagsstevnu í Kollafirði**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er ikki á hvørjum ári, at 10-mannafarið hjá klaksvíkingum vinnur. Leygardagin var Klaksvíkingur fyrstur á mál, eftir at hann hevði verið í framúr endaspurti við Eysturoyingin, sum í 1998 útgávuni segði farvæl við FM kappingina – í hvussu so er í hesum umfarinum. Á jóansøku nú leygardagin verður tað nýggi báturin, sum fer at umboða stolta Kappróðrarfelagið NSÍ, tá ið 10-mannaførini fara at rógva.

Í tveimum teimum fyrstu FM róðrunum í ár vann Eysturoyingur. Klaksvíkingur var næstfremstur, og tað var ikki tað, sum teir høvdu roknað við. Tí kendist sigurin hjá teimum í Kollafirði kærkomin og søtur. Hann ber við sær, at tað aftur er kapping um FM heitið, sum tað í hvussu so er verður spenningur um, inntil tað um knappar tvær vikur hevur verið kappast í Fuglafirði.

Ormurin Langi hekk leingi væl uppií, men tá ið tað restaðu einir 500 metrar slitnaði sundur. Síðani stóð kappingin millum Eysturoying, sum fekk besta startin, og mest sum allan vegin var hálva bátslongd fremstur, og so Klaksvíking.

- Tá ið stýrimaðurin helt, at tað restaðu 300 metrar, rópti hann, og vit góvu alt í tredivu tøkum. Rokningin gekk uppá, at tá skuldu vit verið komnir á mál. Vit tóku ta hálvu bátslongdina, sum vit vóru aftanfyri Eysturoying. Trupulleikin var, at tað vísti seg, at vit vóru ikki komnir á mál. Tað restaðu fimtan tøk, greiðir Martin Venned, sum situr á toftini á stýriborð umborð á Klaksvíkingi, frá:

- Tá kendu vit okkum heilt útkoyrdar, og tað dróg saman aftur millum Eysturoying og okkum. Tíbetur eydnaðist tað okkum akkurát at verða undan Eysturoyingi, tá ið vit fóru um málið.

Tað kemur sjáldan fyri, at áskoðararnir uppliva so tætta og intensa kapprógving, sum teir gjørdu í Kollafirði, har teir báðir fremstu bátarnir lógu borð um borð og í harðari kapping gjørdu best hugsandi reklamu fyri kappróðrinum.

Klaksvíkingur luttók fyrstu ferð í 2002. Síðani tá hevði hann, undan leygardegnum í Kollafirði, vunnið fýra róðrar. Allir vórðu teir vunnir í 2006, tá ið Klaksvíkingur vann FM. Fyri trimum árum síðani var Sundalagsstevna eisini í Kollafirði. Ta ferðina vunnu klaksvíkingar, og nú teir hava vunnið tvær ferðir á rað í Kollafirði, kunnu teir ivaleyst siga, at tað er ikki so galið í Kollafirði!

| Úrslitini á sundalagsstevnu | |
|---|---|
| **5-mannafør, dreingir** | |
| 1 Tjaldrið | 05:21.12 |
| 2 Báran | 05:24.15 |
| 3 Junkarin | 05:25.14 |
| 4 Blikur | 05:27.03 |
| 5 Teistin | 05:29.07 |
| 6 Kollur | 05:32.09 |
| 7 Jallurin | 05:32.13 |
| 8 Royndin Fríða | 05:33.21 |
| 9 Ritan | 05:47.08 |
| 10 Firvaldur | 05:51.00 |
| **6-mannafør, kvinnur** | |
| 1 Gongurólvur | 05:30.16 |
| 2 Páll Fangi | 05:31.12 |
| 3 Jarnbardur | 05:34.07 |
| 4 Sølmundur | 05:38.12 |
| 5 Hvessingur | 05:39.21 |
| 6 Romvlvs | 05:43.04 |
| **5-mannafør, gentur** | |
| 1 Jallurin | 05:54.11 |
| 2 Sílið | 05:57.06 |
| 3 Firvaldur | 05:59.13 |
| 4 Hvassi | 06:07.05 |
| 5 Kollur | 06:08.04 |
| 6 Falkur | 06:12.03 |
| 7 Junkarin | 06:21.04 |
| 8 Havfrúgvin | 06:22.23 |
| **5-mannafør, kvinnur** | |
| 1 Frúgvin | 05:35.24 |
| 2 Erla Kongsdóttir | 05:39.18 |
| 3 Hvassi | 05:52.03 |
| 4 Ritan | 06:00.18 |
| 5 Blikur | 06:14.12 |
| **6-mannafør, menn** | |
| 1 Riddarin | 07:36.24 |
| 2 Tvørabáturin | 07:37.04 |
| 3 Sundabáturin | 07:40.07 |
| 4 Smyril | 07:46.20 |
| 5 Skúgvur | 07:50.20 |
| 6 Gongurólvur | 07:52.10 |
| 7 Rádni | 07:53.12 |
| 8 Hósvíkingur | 08:00.08 |
| 9 Kollfirðingur | 08:00.24 |

# Frúgvin best í Kollafirði

**Fyri fyrstu ferð síðani á Sundalagsstevnu í 2007 eydnaðist tað Frúnni leygardagin at vinna**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist ikki Erlu Kongsdóttir úr Fuglafirði leygardagin at vinna fyri triðju ferð á rað.

Hesa ferð var tað Frúgvin úr Miðvági, sum var fyrst á mál. Sigurin var rættuliga trivaligur. Frúgvin legði bragdliga fyri, og oddasessurin varð ongantíð hóttur. Frúgvin helt undan kappingarneytunum, og á málinum var hon gott og væl leys av Erlu Kongsdóttir.

Tær úr Fuglafirði fingu ikki so góðan start, men tað var kortini eingin ivi um næstfremsta plássið.

Tað kom ikki óvæntað á, at Frúgvin vann. Bæði á norðoyastevnu og á fjarðastevnu hevur talan verið um tætta kapping millum Erlu Kongsdóttir og Frúnna.

Talan var um fyrsta sigurin hjá Frúnni í tvey ár. Seinast Frúgvin úr Miðvági vann, var tað á sundalagsstevnu í 2007. Í fjør vann Sílið allar róðrarnar í hesi kappingini. Higartil í ár hevur Sílið ikki luttikið í FM kappingini.




*Fyri fyrstu ferð í tvey ár kom Frúgvin úr Miðvági fyrst um málið í FM-kappróðri*
*Mynd: Álvur Haraldsen*